Føroyska Bíbliufelagið



Kirkjuárið 2021-22

# BÍBLIULESIÆTLANIN

***Soleiðis gert tú:***
Fyri hvønn dag í árinum er eitt skriftstað sum til dømis Jóh. 5,1-18 (Jóhannesevangeliið kapittul 5, ørindini 1-18). Blaða upp í tínari Bíbliu og les allan tekstin.
Aftast í bíbliulesiætlanini er listi við styttingum.

**Bíbliulesiætlanin**
Útgevari: Føroyska Bíbliufelagið
Lesiætlan og tematekstir: Lars Ole Gjesing
Ritstjórn: Hannah Lang og Mathias Anker Kure
Permumynd:
Grafikkur: Ann Degen
Týðing og rættlestur: Hjørleif Poulsen og Henrietta Arge Jacobsen
Uppseting og prent: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Tær høgu tíðirnar!

Hesi slagorð eru navnið á einum felagsskapi, sum hjálpir børnum og ungum til eitt betri lív við at lesa bøkur. Bókmentir kunna broyta lív, sigur felagsskapurin. Á heimasíðuni eru hugvekjandi frásøgnir frá ungum, sum hava fingið sjálvsinnlit og sjálvsvirði við at spegla sær í søgum hjá øðrum.

Jú, bøkur kunna nakað. Og tað kann bókanna bók – Bíblian – so sanniliga. Her eru fólk av kjøti og blóði. Frásøgnir frá veruliga lívinum uppá gott og ónt. Drápuligar søgur um veruligar bardagar um lív ella deyð. Bardaga millum tað góða og ónda, og vit vera avbjóðað til at velja síðu, samstundis sum vit vera mint á, at Gud, frá tíðarinnar morgni, hevur valt okkum og skapt okkum ”bara eitt sindur verri enn seg sjálvan”.

Ein av mínum yndissøgum í Bíbliuni, er talan hjá Josva til ísraelsfólk eftir heimkomuna úr Egyptalandi. Her nevnir hann alt tað, sum Gud hevur gjørt fyri tey og sigur: Hvørjum vilja tit fylgja? ”Eg og hús mítt, vilja tæna Harranum” er svarið frá Josva.

Bíblian megnar nakað, sum aðrar bøkur ikki kunna. Hon gevur okkum innlit í Skaparans hugsanir við skapanarverkinum – við okkum. Guds orð er ein ótømandi kelda til vísdóm og innlit. Eitt spegl verður hildið fyri okkum. Vit síggja okkum sjálvi í tí stóru søguni – ja, í teimum størstu søgunum. Vit síggja okkum sjálvi sum undurfullar skapningar – ynskt frá tíðarinnar morgni og fevnd av kærleikanum frá byrjan til enda. Bókmentir kunna broyta lív, men Bíblian er lívgevandi á meira enn ein hátt. Hetta síggja vit eisin aftur í teimum fimm persónligu søgunum inni í Bíbliulesiætlanini.

Bíbliulesiætlanin gevur dagliga hjálp til at fáa lesiroyndirnar. Sunnudags-lesnaðurin í ætlanini, fellur saman við lestrinum í kirkjuárinum – í ár, eftir aðru tekstarøð. Lesnaðurin til hinar dagarnar í vikuni, er ætlaður at lýsa og geva innlit til tekstin sunnudag. Man kann lesa ymsastaðni í Bíbliuni, men man verður hildin á sporinum av einum evni, viku fyri viku.

Tak og les – fyri lívið!

Peder Ø. Andreasen, Stýrisformaður í Danska Bíbliufelagnum

# NOVEMBER - DESEMBER

| | | |
|---|---|---|
| Sunnudagur 28. | 1.s. í advent // **Luk 4,16-30** |
| Mánadagur 29. | **Sl 45,1-18** // Kongsdøtur eru millum kostir tínar |
| Týsdagur 30. | **Luk 13,22-30** // Eg veit ikki, hvaðan tit eru |
| Mikudagur 1. | **Ef 5,8-20** // Vakna, tú, sum svevur |
| Hósdagur 2. | **Ef 5,21-33** // Eg meini við Krist og kirkjuliðið |
| Fríggjadagur 3. | **Opb 3,1-6** // Vakna og styrk alt hitt |
| Leygardagur 4. | **Opb 19,1-10** // Komið er at brúdleypi lambsins |
| Sunnudagur 5. | 2.s. í advent // **Matt 25,1-13** |
| Mánadagur 6. | **1 Mós 22,9-19** // Av avkomi tínum skulu allar ættir á foldini fáa signing |
| Týsdagur 7. | **Sl 105,1-15** // Um ævir hann minnist sáttmála sín |
| Mikudagur 8. | **Jes 43,1-13** // Eingin frelsir úr mínum hondum |
| Hósdagur 9. | **Mál 2,17-3,5** // Sí, eg sendi ørindreka mín |
| Fríggjadagur 10. | **Mál 3,16-4** // Skal rættvísisólin rísa |
| Leygardagur 11. | **Áps 3,12-26** // Boðað við munninum á øllum profetunum |
| Sunnudagur 12. | 3.s. í advent // **Luk 1,67-80** |
| Mánadagur 13. | **2 Kong 5,1-16** // Hann var reinur |
| Týsdagur 14. | **Mark 7,1-23** // Soleiðis verður øll føði rein |
| Mikudagur 15. | **Jóh 1,14-18 og 29-34** // Eg sá andan stíga niður av himni |
| Hósdagur 16. | **Áps 18,24-19,7** // Við umvendingar dópi |
| Fríggjadagur 17. | **1 Jóh 5,1-12** // Tann, sum hevur sonin, hevur lívið |
| Leygardagur 18. | **2 Jóh 1-13** // Jesus er Kristus |
| Sunnudagur 19. | 4.s. í advent // **Jóh 3,25-36** |
| Mánadagur 20. | **1 Kor 1,8-2,5** // Kristus krossfestan |
| Týsdagur 21. | **2 Kor 4,1-18** // Altíð bera vit deyða Jesu við okkum |
| Mikudagur 22. | **Fil 2,1-13** // Varð lýðin til deyða |
| Hósdagur 23. | **2 Tim 2,1-13** // Avnokta vit, skal hann eisini avnokta okkum |
| Fríggjadagur 24. | Jólaaftan // **Luk 2,1-14** ella **Matt. 1,18-25** |
| Leygardagur 25. | Jóladagur // **Jóh. 1,1-14** |
| Sunnudagur 26. | 2. jóladagur // **Matt 10,32-42** |
| Mánadagur 27. | **4 Mós 24,10-19** // Stjørna rennur upp |
| Týsdagur 28. | **Sl 72,1-15** // Kongar munnu gávur honum bera |
| Mikudagur 29. | **Mika 5,1-8** // Hann skal vera friður |
| Hósdagur 30. | **Jóh 12,34-50** // Eg eri ljós, komið í heimin |
| Fríggjadagur 31. | **1 Jóh 1,1-10** // Gud er ljós |

# JANUAR

| | |
|---|---|
| Leygardagur 1. | Nýggjársdagur // Matt 6,5-13 |
| Sunnudagur 2. | Sunnudagur e. nýggjár // **Matt 2,13-18** |
| Mánadagur 3. | Mark 9,33-42 // Hvør teirra var størstur |
| Týsdagur 4. | **Luk 22,14-30** // Eg eri millum tykkara |
| Mikudagur 5. | **Jóh 8,31-41** // Ikki gitnir í hori |
| Hósdagur 6. | Trettandi // **Matt 2,1-12** // Frá tær skal koma ein høvdingi |
| Fríggjadagur 7. | **Gal 3,23-4,7** // Tit eru øll Guds børn |
| Leygardagur 8. | **Ef 1,3-14** // hann frammanundan ætlaði okkum til at hava barnakor |
| Sunnudagur 9. | 1.s.e. trettanda // **Mark 10,13-16** |
| Mánadagur 10. | **2 Mós 17,1-7** // Gev okkum vatn at drekka! |
| Týsdagur 11. | **1 Kong 8,1-13** // Dýrd Harrans fylti hús Harrans |
| Mikudagur 12. | **1 Kong 8,14-30** // Man Gud veruliga búgva á jørðini? |
| Hósdagur 13. | **Sl 51,1-21** // Tak ei tín heilaga anda frá mær! |
| Fríggjadagur 14. | **Róm 8,1-11** // Andi Guds býr í tykkum |
| Leygardagur 15. | **Gal 5,13-26** // Gangið fram í andanum |
| Sunnudagur 16. | 2.s.e. trettanda // **Luk 19,1-10** |
| Mánadagur 17. | **Matt 17,14-21** // Tit eru so fátrúnir |
| Týsdagur 18. | **Jóh 13,1-17** // Eg havi givið tykkum eitt fyridømi |
| Mikudagur 19. | **1 Kor 9,1-14** // Vit hava ikki nýtt henda rætt |
| Hósdagur 20. | **1 Kor 9,15-27** // Trælur hjá øllum |
| Fríggjadagur 21. | **2 Kor 6,1-13** // Tænastan skal ikki verða lastað |
| Leygardagur 22. | **1 Tim 3,1-13** // Kirkjuliðstænarar eiga at verða virðiligir |
| Sunnudagur 23. | 3.s.e. trettanda // **Luk 17,5-10** |
| Mánadagur 24. | **2 Mós 14,1-18** // Hav tú upp hond tína |
| Týsdagur 25. | **2 Mós 14,19-31** // Harrin gjørdi havið at turrlendi |
| Mikudagur 26. | **Job 38,1-21** // Her steðgi tínir stoltu streymar |
| Hósdagur 27. | **Sl 104,1-18** // Høgaloft títt tú í havdýpi byggir |
| Fríggjadagur 28. | **Jón 2,1-11** // Havdýpið var um meg |
| Leygardagur 29. | **Mark 4,35-41** // Vindur og vatn eru honum lýðin? |
| Sunnudagur 30. | 4. s.e. trettanda // **Matt 14,22-33** |
| Mánadagur 31. | **Sl 6,1-11** // Harri, hvør leingi? |

# Fimm spurningar til Jógvan á Lakjuni



**Nær ella hvar lesur tú í Bíbliuni?**
Í mínum barnaheimi var Bíblian ein natúrligur partur av gerandisdegnum, og frá smádreingi av lærdi eg at virða hana og gera hana til ein fastan tátt í tilveruni. So, hóast ikki altíð so regluliga, so havi eg gjøgnum alt lívið lisið Guds orð - stundum meira og stundum minni. Eitt sindur skiftandi, nær á degnum eg havi lisið í Bíbliuni. Tá ið eg var yngri, kanska mest um kvøldið, meðan nú og tey seinastu árini havi eg vant meg til sum tað fyrsta um morgunin at seta meg við Bíbliuni.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Jesus er persónurin yvir øllum øðrum, Guds sonur, sum gav upp sína dýrd, gjørdist menniskja og kom til jarðar at bøta fyri syndir okkara, soleiðis at vit við at trúgva á Hann ikki skulu fortapast, men hava ævigt lív. Tað eru annars nógvir yndispersónar, eg kundi nevnt, Ábraham, Móses, Jósef, Dávid, Pætur og Paulus. Men skal eg nevna ein, so er tað Dánjal profetur, sum blaðungur og herleiddur til fremmant land setti sær fyri at gera tað rætta. Og Gud var við honum og gav honum vit og ovurhonds vísdóm.

**Hvat er títt yndisvers ella -brot?**
Skal nevna tvey av mínum yndisversum. Lærdi tey uttanat á barnalegu við Áir í 1965, og tey hava verið barlast alt lívið: 1. Jóh. 5:13: "Hetta havi eg skrivað til tykkara, fyri at tit skulu vita, at tit hava ævigt lív, tit, ið trúgva á navn Guds Sonar". Josva 1:9: "Havi Eg ikki sagt við teg, at tú skalt vera hugreystur og sterkur, ikki missa mótið og ikki ræðast! Tí HARRIN Gud tín er við tær í øllum, sum tú fert undir at gera". Annars eru m.a. Sálmur 91, Orðtøkini og líðingarsøga Jesusar støð í Bíbliuni, eg altíð vendi aftur til.

**Hví skulu vit lesa í Bíbliuni?**
Vit skulu lesa í Bíbliuni, tí hon er Guds orð til okkara. Í 2. Tim. 3,16-17 stendur: "Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi, so gudsmenniskjað kann verða fullkomið, ført fyri at gera alt gott verk." Okkum tørvar føði fyri at liva, og gevast vit at eta, so vikna vit skjótt. Tað sama kunnu vit siga um okkara andaliga lív. Vit mugu fáa andaliga føði.

**Hvørja frásøgn vilt tú viðmæla einum nýggjum bíbliulesara?**
Hugsi, at tað er gott hjá einum nýggjum bíbliulesara at byrja við at lesa evangeliini, sum siga frá lívi Jesusar, virki, undurverkum, deyða og uppreisn hansara. Hjá børnum er kanska gott at byrja við at lesa onkra av teimum frálíku barna- og myndabíbliunum, sum vit eiga á føroyskum.

# FEBRUAR

| | |
|---|---|
| Týsdagur 1. | **Matt 26,36-46** // Hann gjørdist syrgin |
| Mikudagur 2. | **Mark 9,2-13** // Ein rødd kom út úr skýnum |
| Hósdagur 3. | **Mark 10,17-31** // Kom so og fylg mær! |
| Fríggjadagur 4. | **Kol 2,6-23** // Tit eru rótfestir og verða uppbygdir í honum |
| Leygardagur 5. | **Kol 3,1-17** // Tit eru uppreistir saman við Kristi |
| Sunnudagur 6. | 5. s.e. trettanda // **Matt 13,44-52** |
| Mánadagur 7. | **Orðt 11,24-31** // Ein gevur ríkliga og fær altíð meira aftur |
| Týsdagur 8. | **Matt 13,10-17** // Honum skal verða givið |
| Mikudagur 9. | **Róm 12,1-8** // Vit hava ymisligar náðigávur |
| Hósdagur 10. | **1 Kor 4,1-16** // Og hvat hevur tú, sum tú ikki hevur fingið? |
| Fríggjadagur 11. | **Fil 3,1-11** // Av sonnum haldi eg eisini alt vera tap |
| Leygardagur 12. | **Fil 3,12-21** // Eg skundi soleiðis at málinum |
| Sunnudagur 13. | Septuagesima // **Matt 25,14-30** |
| Mánadagur 14. | **Job 14,1-15** // Tí at fyri trænum er vón |
| Týsdagur 15. | **Job 38,22-38** // Hvør føðir rím himinsins? |
| Mikudagur 16. | **Sl 80,1-20** // Tað breiddi út at havinum kvistar sínar |
| Hósdagur 17. | **Jóel 3,13-21** // Akrarnir eru stadnir |
| Fríggjadagur 18. | **1 Pæt 4,1-19** // Dómurin skal byrja |
| Leygardagur 19. | **Opb 14,14-20** // Akur jarðarinnar er staðin |
| Sunnudagur 20. | Seksagesima // **Mark 4,26-32** |
| Mánadagur 21. | **Sl 22,1-19** // Hví ert tú farin frá mær? |
| Týsdagur 22. | **Sl 22,20-32** // Hann hevur útint sítt verk |
| Mikudagur 23. | **Jes 52,13-53,3** // Avskeplað var ásjón hans |
| Hósdagur 24. | **Jes 53,4-12** // Harrin læt okkara skuld koma niður á hann |
| Fríggjadagur 25. | **Luk 23,1-17** // Teir førdu hann til Pilatusar |
| Leygardagur 26. | **Luk 23,18-38** // Teir krossfestu hann |
| Sunnudagur 27. | Sunnudagur í føstuinngangi // **Luk 18,31-43** |
| Mánadagur 28. | **Jes 42,1-9** // Sí tænari mín, sum eg styði |

# MARS

| | |
|---|---|
| Týsdagur 1. | **Jes 49,1-10** // Harrin hevur kallað meg |
| Mikudagur 2. | **Jes 50,4-11** // Harrin, drottin, hjálpir mær |
| Hósdagur 3. | **1 Kor 6,1-11** // Hini heilagu eiga at døma heimin |
| Fríggjadagur 4. | **1 Pæt 5,1-14** // ikki heldur soleiðis, at tit vilja ráða |
| Leygardagur 5. | **Opb 3,14-22** // Tann, sum sigrar, hann skal eg lata sita hjá mær |
| Sunnudagur 6. | 1.s. í føstu // **Luk 22,24-32** |
| Mánadagur 7. | **Sl 77,1-16** // Á degi í trongd míni eg søki til Harrans |
| Týsdagur 8. | **Sl 130,1-8** // Harri, hoyr mína rødd! |
| Mikudagur 9. | **Mark 6,1-13** // Hann undraðist á vantrúgv teirra |
| Hósdagur 10. | **Áps 8,26-39** // Trýrt tú av øllum hjarta tínum |
| Fríggjadagur 11. | **Áps 9,36-43** // Pætur fell á knæ og helt bøn |
| Leygardagur 12. | **Ják 5,12-20** // Hevur nakar av tykkum tað ringt |
| Sunnudagur 13. | 2.s. í føstu // **Mark 9,14-29** |
| Mánadagur 14. | **1 Mós 3,1-13** // Tað var ormurin, ið tøldi meg |
| Týsdagur 15. | **1 Mós 3,14-24** // Avkom hennara skal morla høvur títt |
| Mikudagur 16. | **Job 1,6-22** // Tá man hann so sanniliga banna tær |
| Hósdagur 17. | **Job 2,1-10** // Hann sló Job við ringum svullum |
| Fríggjadagur 18. | **Mark 3,20-30** // Beelsebul er í honum |
| Leygardagur 19. | **Jóh 16,25-33** // Eg eri gingin út frá faðirinum |
| Sunnudagur 20. | 3.s. í føstu // **Jóh 8,42-51** |
| Mánadagur 21. | **2 Mós 16,1-12** // Eg vil lata breyð regna niður av himni |
| Týsdagur 22. | **2 Mós 16,13-21** // Hetta er tað breyðið, sum Harrin gevur tykkum |
| Mikudagur 23. | **2 Mós 16,22-36** // Ísraelsfólk nevndu tað manna |
| Hósdagur 24. | **Sl 104,19-35** // Tey verða mett av góðum |
| Fríggjadagur 25. | **Luk 22,7-20** // Hetta er likam mítt |
| Leygardagur 26. | **1 Kor 11,17-34** // Ta náttina sum hann varð svikin |
| Sunnudagur 27. | Miðføstu sunnudagur // **Jóh 6,35-51** |
| Mánadagur 28. | **1 Mós 17,1-14** // Eg geri sáttmála millum mín og tín |
| Týsdagur 29. | **1 Sám 1,1-16** // Hanna var barnleys |
| Mikudagur 30. | **1 Sám 1,17-28** // Tí vil eg eisini geva Harranum hann |
| Hósdagur 31. | **1 Sám 2,1-11** // Hann reisir hin máttleysa úr dustinum |

# Fimm spurningar til Marnu E. Jensen

**Nær ella hvar lesur tú í Bíbliuni?**
Eg kundi ynskt, at eg las í Bibliuni hvønn morgun, men eg eri ikki morgunfólk, og tí má eg finna mær aðrar løtur á degnum. Mangan verður tað til, at maðurin og eg lesa saman um kvøldið á fartelefonini ella í bíbliuni. Leygarmorgnar kunna vit tó sita leingi við morgunmatarborðið, har vit hava okkara serligu bíbliu- og bønarløtur.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Uttan samanbering er Jesus mín yndispersónur! Eg gleði meg til løtuna, tá ið eg í rættlæti skal síggja hann og mettast av hansara ásjón, tá ið eg vakni (Sl. 17,15). Eisini gleði eg meg til at møta kvinnuni úr Sikar, sum vit hoyra um í Jóh. 4, og eg hugsi eisini at spyrja Pætur, hvussu tað var at fáa eina serliga heilsan frá Jesusi, eftir at hann hevði bannað uppá, at hann ikki kendi hann (Mark. 16,7).

**Hvat er títt yndisvers ella brot?**
Tað veldst um, hvat upptekur meg. Hugsi eg um mína egnu frelsu, eri eg serliga takksom fyri Róm. 8,1 – at tað eingin fordøming er fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi. Í Jesusi eri eg fullkomin. Tað finst einki, ið kann døma meg. Guð er nøgdur og fríkennir meg.
Tá ið avbjóðingar av ymsum slag tykjast ov stórar, eri eg takksom fyri at kunna krøkja meg í Guðs stóru lyfti – t.d. Sl. 61,3: á fjallið, ið er mær ov høgt, tú leiði meg upp!
Eitt vers, sum eisini er mær til stóra gleði, er Sl. 68,20: Lovaður Harrin veri, dag eftir dag hann okkum ber, tann Guð, ið er frelsa vár. Sela. Hetta valdu maður mín og eg at fáa graverað í okkara ringar.

**Hví skulu vit lesa í Bíbliuni?**
Bíblian er ikki bara orð um Guð. Hon er Guðs orð. Tað ger hana øðrvísi enn allar aðrar bøkur.
Í Bíbliuni avdúkar Guð hvør hann er, og vit læra Guð betur at kenna. Bíblian er ferðamatur til halgan stað.
Í 1. Kong. 19 ff. lesa vit um Elia-profet, at hann, aftaná gudaroyndina á Karmel, fór út í oyðimørkina og ynskti sær deyðan. Men ein eingil kom til hansara og segði: “Rís upp og et, tí at annars verður leiðin tær ov long!” (v. 7). Støðan hjá okkum, sum eru á veg til



himmals, líkist hansara: Um vit ikki taka ímóti tí andligu føðini í Guds orði, hokna vit á vegnum, og vandi er fyri, at leiðin verður ov tung.
Gjøgnum Jesaja sigur Guð okkum, at høvdu vit givið orðum hansara gætur, so hevði friður okkara verið sum flóðin (Jes. 48,18).
Trúgvin kemur av tí, sum hoyrt verður. Hon livir av og verður hildin uppi av Guðs orði. Tí er tað umráðandi, at vit lata Guðs orð búgva okkara millum (Kol. 3,16).

**Hvørja frásøgn vilt tú viðmæla einum nýggjum bíbliulesara?**
Tað veldst um, hvør støðan er. Stríðist man við at fáa frið við Guð, viðmæli eg at lesa 1. Jóh. 5,9-13. Er tað stúran um eitthvørt, vildi eg viðmælt Matt. 6,25-34.
Guðs orð er á ein hátt so einfalt, at eitt barn skilir tað. Samstundis er tað so djúpt, at vit aldrin gerast liðug at grunda um tað.

# APRÍL

| | |
|---|---|
| Fríggjadagur 1. | **Sl 125,1-126,6** // Stórverk hevur Harrin gjørt móti hesum |
| Leygardagur 2. | **Ják 2,1-13** // Hevur Gud ikki valt út hinar fátæku |
| Sunnudagur 3. | Boðanardagur Mariu // **Luk 1,46-56** |
| Mánadagur 4. | **2 Mós 30,23-38** // Heilaga salvingarolju |
| Týsdagur 5. | **5 Mós 15,1-11** // Tú mást ikki lata hond tína aftur |
| Mikudagur 6. | **1 Sám 16,1-13** // Fyll nú horn títt við olju |
| Hósdagur 7. | **1 Kong 1,32-40** // Sádok prestur salvaði Sálomon |
| Fríggjadagur 8. | **Ják 2,14-26** // Vermið tykkum og etið tykkum mett |
| Leygardagur 9. | **1 Jóh 3,11-24** // Kann tá kærleiki Guds verða verandi í honum? |
| Sunnudagur 10. | Pálmasunnudagur // **Mark 14,3-9 ella Jóh 12,1-16** |
| Mánadagur 11. | **Esek 37,1-14** // Eg lati anda koma í tykkum |
| Týsdagur 12. | **1 Kor 15,1-19** // Kristus stóð upp triðja dagin |
| Mikudagur 13. | **1 Kor 15,20-34** // Øll verða gjørd livandi í Kristi |
| Hósdagur 14. | Skírisdagur // **Jóh 13,1-15** |
| Fríggjadagur 15. | Langi fríggjadagur // **Jes 53** (**Luk 23,26-49** ella **Jóh 19,17-37**) |
| Leygardagur 16. | **1 Kor 15,35-58** // Deyðin er uppslúkaður í sigur |
| Sunnudagur 17. | Páskadagur // **Matt 28,1-8** |
| Mánadagur 18. | 2. páskadagur // **Jóh 20,1- 8** |
| Týsdagur 19. | **Luk 5,1-11** // Hereftir skalt tú veiða menn |
| Mikudagur 20. | **Jóh 13,21-38** // Eg vil leggja lív mítt á fyri teg |
| Hósdagur 21. | **Jóh 18,15-27** // Tá noktaði Pætur aftur |
| Fríggjadagur 22. | **Jóh 21,1-14** // Setið nótina út høgrumegin |
| Leygardagur 23. | **2 Pæt 1,12-21** // Og hesa rødd hoyrdu vit sjálvir |
| Sunnudagur 24. | 1.s.e. páskir // **Jóh 21,15-19** |
| Mánadagur 25. | **Sl 23,1-6** // Harrin er hirði mín |
| Týsdagur 26. | **Jer 23,1-8** // Tit hava spjatt og stygt burtur seyðir mínar |
| Mikudagur 27. | **Matt 26,57-68** // Ert tú Kristus, sonur Guds? |
| Hósdagur 28. | **Jóh 5,31-47** // Teir gerningar, sum eg geri, vitna um meg |
| Fríggjadagur 29. | **Jóh 10,1-10** // Hann kallar seyðir sínar við navni |
| Leygardagur 30. | **Jóh 17,9-19** // Eingin teirra glataðist |

# MAI

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 1. | **2.s.e. páskir** // Jóh 10,22-30 |
| Mánadagur 2. | **2 Mós 3,1-6** // Hann ræddist at síggja Gud |
| Týsdagur 3. | **2 Mós 24,1-18** // Har sóu teir Ísraels Gud |
| Mikudagur 4. | **2 Mós 33,12-23** // Lat meg tó síggja dýrd tína |
| Hósdagur 5. | **Sl 42,1-12** // Nær skal eg koma og skoða Guds ásjón? |
| Fríggjadagur 6. | **1 Tim 6,11-21** // Hann sum eingin menniskja hevur sæð |
| Leygardagur 7. | **1 Jóh 4,11-21** // Eingin hevur á nøkrum sinni sæð Gud |
| Sunnudagur 8. | 3.s.e. páskir // **Jóh 14,1-11** |
| Mánadagur 9. | **4 Mós 21,1-9** // Ger tær koparorm |
| Týsdagur 10. | **Jóh 3,13-21** // Soleiðis eigur menniskjusonurin at verða upphevjaður |
| Mikudagur 11. | **Róm 6,12-23** // Tit eru vorðin tænarar Guds |
| Hósdagur 12. | **Gal 4,21-31** // Vit eru ikki trælkvinnubørn |
| Fríggjadagur 13. | Dýri biðidagur // **Matt 7,7-14** |
| Leygardagur 14. | **Gal 5,1-18** // Til frælsis hevur Kristus fríað okkum |
| Sunnudagur 15. | 4.s.e. páskir // **Jóh 8,28-36** |
| Mánadagur 16. | **Jóh 2,1-11** // Enn er mín tími ikki komin |
| Týsdagur 17. | **Jóh 7,25-36** // Hann hevur sent meg |
| Mikudagur 18. | **Kol 1,12-23** // Hann er fyrr enn allir lutir |
| Hósdagur 19. | **Hebr 1,1-14** // Hann er ljómin av dýrd hansara |
| Fríggjadagur 20. | **Hebr 2,1-13** // Tey børn, sum Gud hevur mær givið |
| Leygardagur 21. | **1 Jóh 5,13-21** // Tit hava ævigt lív |
| Sunnudagur 22. | 5.s.e. páskir // **Jóh 17,1-11** |
| Mánadagur 23. | **Orðt 8,1-21** // Sannleika talar munnur mín |
| Týsdagur 24. | **Orðt 8,22-36** // Tá var eg honum hjá |
| Mikudagur 25. | **1 Kor 1,4-17** // Eg áminni tykkum at tit mega vera sameindir |
| Hósdagur 26. | Kristi himmalferðardagur // **Luk 24,46-53** |
| Fríggjadagur 27. | **1 Kor 12,12-31** // Likamið er eitt |
| Leygardagur 28. | **Ef 4,1-16** // Varðveita einleika andans |
| Sunnudagur 29. | 6.s.e. páskir // **Jóh 17,20-26** |
| Mánadagur 30. | **Esek 11,15-25** // Eg skal geva teimum nýtt hjarta |
| Týsdagur 31. | **Esek 36,22-36** // Anda mín leggi eg tykkum í bróst |

# Fimm spurningar til Signar Dam



**Nær ella hvar lesi eg í Bíbliuni?**

Bíblian er mær kær. Mína fyrstu Bíbliu fekk eg í konfirmatiónsgávu frá foreldrunum, og nýti eg hana enn, hóast hon er slitin og skrødd, bløð eru leys og onkur síða er burtur. Eisini havi eg fingið mær Bíbliuappina á telefonina, og hon er sera hent at hava við hondina. Áðrenn morgunmatin hvønn morgun havi eg til vana at lesa eitt stykkið, og leggja dagin í Harrans hendur. Oftast brúki eg Bíbliulesiætlanina og lesi tað stykki, sum har er fyrisligið. Eg føli, at hettar er ein góður máti at byrja dagin. Eisini lesi eg tá farið verður til songar.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**

Bíbliunnar høvuðspersónur er Jesus, men um eg skal nevna ein annan, so kundi tað verið Pætur, sum var so sera avgjørdur og bráræsin. Hann vildi so gjarna vera líðin og fylgja Jesusi, men snávaði so mangan, leyp framav og enntá sveik frelsaran tá mest stó á, men hann vendi altíð aftur og fekk fyrigeving. Tað er so vigtugt, at vit viðganga okkara føll og biða um fyrigeving. “Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi” 1. Jóh 1:9

**Hvat er títt yndisvers ella brot?**

Fiskiveiða Pæturs, Luk 5:2. Vit fáa at vita, at teir høvdu roynt alla náttina, men einki fingið. Jesus biður teir fara at seta gørnini út enn eina ferð. Pætur svarar: “Eftir tínum orði vil eg seta gørnini út aftur”. Teir fingu eina so stóra mongd, sum teir neyvan áður høvdu sæð. Vanlig mannahugsan vildi verið, at nú teir høvdu troffið við fiskin, var at dríva á við fiskiskapinum, sum nú kastaði so nógv av sær, men nei. Eftir Jesu áheitan “drógu teir bátarnar upp á land, og fóru frá øllum og fylgdu honum”. Teir høvdu sæð tað, ið størri var, frelsaran Jesus son Guðs.

**Hví skulu vit lesa í Bíbliuni?**

Bíblian er Guðs orð. Hon vísir okkum vegin til sannleikan og sælu. “So kemur tá trúgvin av tí, sum verður hoyrt, men tað sum verður hoyrt, kemur gjøgnum orð Krists”. Róm 10:17 “Latið orð Krists búgva ríkiliga hjá tykkum í øllum vísdómi, so at tit læra og áminna hvør annan við sálmum og lovsongum og andligum ljóðum, og syngja yndisliga Guði lov í hjørtum tykkara”. Kol 3:16

**Hvørja frásøgn vilt tú viðmæla einum nýggjum Bíbliulesara?**

Rómverjabrævið er sera spennandi og innihaldsríkt, og svarar mongum trúarspurningum. Annars er henda bíbliuætlan ein sera góður lykil til dagsins orð.

# JUNI

Mikudagur 1. **Áps 2,12-24** // Tá skal eg hella út av anda mínum
Hósdagur 2. **Áps 2,25-41** // Tit skulu fáa gávu Heilaga Andans
Fríggjadagur 3. **Hebr 8,1-13** // Eg skal gera nýggjan sáttmála
Leygardagur 4. **1 Jóh 2,1-11** // Vit hava ein talsmann
Sunnudagur 5. Hvítusunnudagur // **Jóh 14,15-21**
Mánadagur 6. 2. hvítusunnudagur // **Jóh 6,44-51**
Týsdagur 7. **Jes 66,18-24** // Teir skulu boða um dýrd mína
Mikudagur 8. **Mika 4,1-8** // Hagar skulu tjóðirnar streyma
Hósdagur 9. **Matt 15,21-28** // Ein kánaneisk kona kom og rópaði
Fríggjadagur 10. **Matt 22,1-14** // Bjóðið so mongum, sum tit hitta
Leygardagur 11. **Opb 21,9-27** // Fólkasløgini skulu ganga í ljósi hansara
Sunnudagur 12. Tríeindar sunnudagur // **Matt 28,16-20**
Mánadagur 13. **Job 29,1-17** // Eg var faðir teirra fátæku
Týsdagur 14. **Job 31,16-32** // Hvønn hevur hann ikki mettað við borð sítt
Mikudagur 15. **Sl 49,1-21** // Óttast tí ei, tá maður gerst ríkur
Hósdagur 16. **Jer 5,20-31** // Ræ ttin hjá fátækum fremja teir ikki
Fríggjadagur 17. **Ám 8,4-14** // Tit, ið níva fátæk
Leygardagur 18. **Ják 5,1-11** // Ríkidømi tykkara er vorðið rotið
Sunnudagur 19. 1.s.e. tríeindardag // **Luk 12,13-21**
Mánadagur 20. **1 Kong 19,1-11** // Mær royna teir eftir til tess at taka meg av lívi
Týsdagur 21. **1 Kong 19,12-21** // Síðan reis hann og fór aftan á Elia
Mikudagur 22. **Jer 11,18-23** // Fram fyri teg havi eg lagt málevni mítt
Hósdagur 23. **Harm 3,1-20** // Sál mín kúrir í mínum barmi
Fríggjadagur 24. **Róm 6,1-11** // Tit eru deyð fyri syndini
Leygardagur 25. **2 Tess 3,6-16** // Tit altíð hava okkum í góðum minni
Sunnudagur 26. 2.s.e. tríeindardag // **Luk 14,25-35**
Mánadagur 27. **Sl 103,1-22** // Hann fyrigevur øll misbrot tíni
Týsdagur 28. **Róm 3,1-20** // Tann er eingin, sum rættvísur er
Mikudagur 29. **Róm 3,21-31** // Rættvísgjørd fyri einki
Hósdagur 30. **Róm 5,1-11** // Vórðu sátt við Gud

# JULI

Fríggjadagur 1. **Róm 5,12-21** // Tey nógvu verða rættvís
Leygardagur 2. **Ef 2,1-10** // Reist okkum upp
Sunnudagur 3. 3.s.e. tríeindardag // **Luk 15,11-32**
Mánadagur 4. **2 Mós 23,1-13** // Kúga ikki útisetan
Týsdagur 5. **3 Mós 19,9-18** // Tú skalt elska næsta tín sum sjálvan teg
Mikudagur 6. **Hós 1,1-2,3** // Júda húsi verði eg náðigur
Hósdagur 7. **Hós 2,4-13** // Eg geri enda á øllum fagnaði hennara
Fríggjadagur 8. **Hós 2,14-23** // Eg man festa mær teg
Leygardagur 9. **Matt 5,27-42** // Tit hava hoyrt, at tað hevur verið sagt
Sunnudagur 10. 4.s.e. tríeindardag // **Matt 5,43-48**
Mánadagur 11. **2 Kong 2,1-14** // Elia fór til himins
Týsdagur 12. **Sl 2,1-12** // Sonur mín ert tú
Mikudagur 13. **Sl 89,20-38** // Tú faðir mín ert
Hósdagur 14. **Matt 18,15-20** // Bundið í himli
Fríggjadagur 15. **Jóh 15,9-25** // Munnu teir eisini forfylgja tykkum
Leygardagur 16. **Kol 1,24-2,5** // Kirkjuliðið, sum eg eri vorðin tænari hjá
Sunnudagur 17. 5.s.e. trieindardag // **Matt 16,13-26**
Mánadagur 18. **5 Mós 5,1-15** // Lógboð, sum eg í dag kunngeri tykkum
Týsdagur 19. **5 Mós 5,16-33** // Fylgið altíð teirri leið
Mikudagur 20. **Job 42,1-6** // Einki er tær ógjørligt
Hósdagur 21. **Orðt 28,14-28** // Hin øvundsjúki skundar sær eftir ríkidømi
Fríggjadagur 22. **Áps 4,32-37** // Tað varð sundurbýtt eftir sum honum var tørvur á
Leygardagur 23. **1 Tim 6,3-10** // Rót til alt tað, sum ilt er
Sunnudagur 24. 6.s.e. tríeindardag // **Matt 19,16-26**
Mánadagur 25. **Sl 8,1-10** // At tær kemur tað í hug
Týsdagur 26. **Sl 36,1-13** // Hjá tær er lívsins kelda
Mikudagur 27. **Sl 57,1-12** // Trygt er hjarta mítt, Gud
Hósdagur 28. **Jes 51,9-16** // Eg, eg eri uggari tín
Fríggjadagur 29. **Luk 12,1-12** // Óttist hann
Leygardagur 30. **Luk 21,5-19** // Tit skulu vinna sálir tykkara
Sunnudagur 31. 7.s.e. tríeindardag // **Matt 10,24-31**

# Fimm spurningar til Jastrid Høj



**Nær ella hvar lesi eg í Bíbliuni?**
Mær dámar best at lesa í Bíbliuni um morgunin, áðrenn daglidagurin byrjar. Tað kann vera við køksborðið, men sum oftast er tað á skrivstovuni hjá okkum heima.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Jesus – høvuðspersónurin í Bíbliuni ið øll skriftin í GT peikar fram ímóti Jesusi, sum kemur at frelsa heimin, og NT tekur støði í Hansara lívi og læru. Hann er mín stóra fyrimynd, besti vinur og tann, sum fyllir alt í øllum í mínum lívi. At lesa um, hvussu hann livdi, hvat hann lærdi og tað, hann gjørdi er bara so fantastiskt. Ápstl. 10:38 lýsir tað so væl: Søguna um Jesus úr Nasaret, hvussu Guð salvaði hann við heilagum anda og kraft, hann sum gekk umkring og gjørdi væl og grøddi øll, sum vóru illa stødd av djevlinum; tí at Guð var við Honum.

**Hvat er títt yndisvers ella brot?**
Johs. 17:3 Men hetta er hitt æviga lívið, at teir kenna teg, hin eina, sanna Guð, og tann, sum tú sendi, Jesus Krist.

**Hví skula vit lesa í Bíbliuni?**
Gud vísir, hvør hann er ígjøgnum Sítt orð, og tað er grundvøllurin í okkara kristna lívi.
Vit mugu eta hvønn dag fyri at liva, og okkara likam veksur og styrkist ígjøgnum heilsugóðan mat. Soleiðis er eisini við okkara andaliga lívi. Vit mugu inntaka Guds orð dagliga fyri at vaksa og styrkjast andaliga. Persónliga fái eg meir burturúr degnum, havi betri uppmerksemi og kenni meir styrki og vísdóm, tá eg byrji dagin saman við Jesusi í bøn og bíbliulesnað. Tað er eisini lættari at hoyra Guds rødd, verða mint á ting ella persónar, tá eg havi fylt meg við Hansara orði. T.d. kann Heilagi Andin minna meg á at geva eitt orð úr Bíbliuni til ein ávísan persón, sum kemur í mínar tankar.
Ferð aftaná ferð havi eg eisini upplivað Guds orð, sum andaligan heiligvág fyri mítt likam. Tað stendur jú eisini í Orðt. 4:22 at tað er øllum teimum lív, sum finna tað, og øllum likami teirra grøðing. Felagsskapurin við Jesus styrkist við at brúka tíð í Orðinum, tí Hann er Orðið.

**Hvørja frásøgn vil tú viðmæla einum nýggjum Bíbliulesara?**
Frásøgnin um hin burturvilsta sonin í Lukas 15:11-32 er sera góð. Hon gevur vón og trúgv uppá ein Faðir, sum elskar okkum og ynskir tað besta fyri okkara lív og framtíð, óansæð hvat vit hava gjørt ella hava upplivað.

## Frá Bíbliufelagnum:

# Bíbliuútgávur í bókabúðunum




## Bíblia – Ættarbíblia

við stórari skrift

Stødd 21,5 x 30,4 cm.
Við gullskurði.
1211 síður
Myndprýtt hevur hennara hátign Margreta drotning II.







## Bíblia

Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður
Kápa: Edward Fuglø

## Bíblia í svørtum

leðurlíki við gullskurði
Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður




Sí annars á www.biblia.fo

# AUGUST

| | |
|---|---|
| Mánadagur 1. | **Jer 14,10-18** // Profetarnir profetera lygnir |
| Týsdagur 2. | **Jer 27,12-22** // Týna lívið saman við profetunum |
| Mikudagur 3. | **Matt 21,18-27** // Hvat vald hevur tú til at gera hetta? |
| Hósdagur 4. | **Luk 6,43-49** // Sum hjartað er fult av |
| Fríggjadagur 5. | **1 Kor 12,1-11** // Jesus er Harri |
| Leygardagur 6. | **2 Tess 2,1-12** // Latið ongan villa tykkum |
| Sunnudagur 7. | 8.s.e. tríeindardag // **Matt 7,22-29** |
| Mánadagur 8. | **Dán 7,1-10** // Síðan varð rætturin skipaður |
| Týsdagur 9. | **Dán 7,11-22** // Ríki hans kann aldri farast |
| Mikudagur 10. | **Matt 24,32-51** // Vakið tí |
| Hósdagur 11. | **Mark 13,28-36** // Verið varnir, vakið og biðið |
| Fríggjadagur 12. | **1 Tess 4,13-5,11** // Sum tjóvur á nátt |
| Leygardagur 13. | **1 Pæt 1,13-25** // Verið ódruknir |
| Sunnudagur 14. | 9.s.e. tríeindardag // **Luk 12,32-48** |
| Mánadagur 15. | **1 Mós 18,16-33** // Vissuliga er rópið |
| Týsdagur 16. | **1 Mós 19,1-11** // Báðir einglarnir komu um kvøldið til Sódomu |
| Mikudagur 17. | **1 Mós 19,12-18** // Bjarga tær, tí at lív títt liggur við |
| Hósdagur 18. | **Esek 28,1-15** // Hevja harmljóð |
| Fríggjadagur 19. | **Esek 28,16-23** // Sí, eg skal koma fram á teg, Sidon |
| Leygardagur 20. | **Matt 9,9-17** // Hann sat til borðs heima við hús |
| Sunnudagur 21. | 10.s.e. tríeindardag // **Matt 11,16-24** |
| Mánadagur 22. | **Sl 25,1-22** // Fyrigev mær allar syndir mínar |
| Týsdagur 23. | **Matt 23,1-15** // Tit lata himmiríkið aftur |
| Mikudagur 24. | **Matt 23,16-33** // Leggja tað eftir, ið vigar meira í lógini |
| Hósdagur 25. | **Luk 5,17-26** // Syndir tínar eru tær fyrigivnar |
| Fríggjadagur 26. | **Luk 8,40-56** // Dóttir mín, trúgv tín hevur frelst teg |
| Leygardagur 27. | **Luk 18,9-17** // Gud náði meg syndara |
| Sunnudagur 28. | 11.s.e. tríeindardag // **Luk 7,36-50** |
| Mánadagur 29. | **1 Kong 10,1-13** // Drotningin av Sába hoyrdi orðrómin um Sálomon |
| Týsdagur 30. | **Jón 1,1-2,1** // Í kviði fisksins |
| Mikudagur 31. | **Jón 3,1-10** // Ninevemenn trúðu Gudi |



# SEPTEMBER

| | |
|---|---|
| Hósdagur 1. | **Jón 4,1-11** // Skuldi eg tá ikki harmast um Nineve? |
| Fríggjadagur 2. | **Jóh 20,19-29** // Sælir eru teir, sum ikki sóu, og trúðu tó |
| Leygardagur 3. | **Opb 13,11-18** // Djórið ger mikil tekin |
| Sunnudagur 4. | 12.s.e. tríeindardag // **Matt 12,31-42** |
| Mánadagur 5. | **Luk 23,26-43** // Teir krossfestu hann |
| Týsdagur 6. | **Tit 2,11-3,6** // Hann sum gav seg sjálvan fyri okkum |
| Mikudagur 7. | **Hebr 2,14-3,6** // Bøta fyri fólksins syndir |
| Hósdagur 8. | **Hebr 4,14-5,10** // Lærdi lýdni av tí, sum hann leið |
| Fríggjadagur 9. | **Hebr 9,1-14** // Bar seg sjálvan fram lýtaleysan |
| Leygardagur 10. | **Hebr 9,15-28** // Avtaka syndina við ofri sínum |
| Sunnudagur 11. | 13.s.e. tríeindardag // **Matt 20,20-28** |
| Mánadagur 12. | **2 Mós 31,3-18** // Hvíludagurin er tekin |
| Týsdagur 13. | **Neh 13,15-22** // Tit vanhalga hvíludagin |
| Mikudagur 14. | **Sl 38,1-23** // Heilt sundursorlaður |
| Hósdagur 15. | **Sl 88,1-19** // Sál mín er av ólukkum mett |
| Fríggjadagur 16. | **Jes 56,1-8** // Varnast at vanhalga hvíludagin |
| Leygardagur 17. | **Jer 17,19-27** // Tit skulu halda hvíludagin heilagan |
| Sunnudagur 18. | 14.s.e. tríeindardag // **Jóh 5,1-15** |
| Mánadagur 19. | **Sl 1,1-6** // Sælur er maður, ið yvir lóg hans grundar |
| Týsdagur 20. | **Orðt 22,17-21** // Boygg oyra títt og lýð á vísmanna orð |
| Mikudagur 21. | **Jóh 11,1-16** // Jesus elskaði Martu og systur hennara og Lásarus |
| Hósdagur 22. | **Jóh 12,1-11** // Marta gekk fyri borðum |
| Fríggjadagur 23. | **Áps 6,1-7** // Tað sømir seg ikki, at vit skulu geva Guds orð yvir |
| Leygardagur 24. | **Ják 1,19-27** // Verðið slíkir, sum gera eftir orðinum |
| Sunnudagur 25. | 15.s.e. tríeindardag // **Luk 10,38-42** |
| Mánadagur 26. | **2 Kong 4,8-24** // Leið hann heim |
| Týsdagur 27. | **2 Kong 4,25-37** // Tak son tín! |
| Mikudagur 28. | **Dán 12,1-13** // Mangir skulu vakna upp |
| Hósdagur 29. | **Hós 6,1-6** // Vit skulu liva fyri ásjón hans |
| Fríggjadagur 30. | **Jóh 6,36-44** // Eg skal reisa hann upp |

# Fimm spurningar til Martin Kúrberg

**Nær ella hvar lesur tú í Bíbliuni?**
Eg lesi hvønn morgun á skrivstovu míni. Eg síggi tað sum eitt sera gott amboð í arbeiði mínum, men ikki minni er tað ein spurningur um at røkja meg sjálvan og samband mítt við frelsara mín.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Meðan eg sat og skuldi byrja eitt nýtt lív, eftir at hava verið úti í misnýtslu í fleiri ár, fann eg eina rúmligheit og meining við at lesa evangeliðiið eftir Jóhannes. Orðini hjá Jóhannusi evangelisti, vóru størri enn mín innara døming av mær sjálvum, og hettar gav mær og gevur framvegis meining fyri meg.

**Hvat er títt yndisvers ella brot?**
Tað er Markus kapittul 4. Eg las hendan kapittul mangan ta tíðina eftir, at vit høvdu mist dóttur okkara og kom hesin kapittul til mín, meðan vit vóru niðri á Ríkissjúkrahúsinum. Hettar er eisini ein kapittul í hevur hildið mær fast og hjálpt mær í mongum tungum løtum.

**Hví skulu vit lesa í Bíbliuni?**
Tað er heilt vist fyri at vit skulu kunna finna styrki til tann dagliga dagin og fyri at minna okkum á tað komandi.

**Hvørja frásøgn vilt tú viðmæla einum nýggjum bíbliulesara?**
Eg vil liðmæla øllum nýggjum lesarum av Bíbliuni at lesa Lukas kapittul 23. Grundin fyri at eg vil viðmæla hendan kapittul er, at hann sigur so ómetaliga nógv um kærleika Guds til okkum menniskju, og lyndi, styrki og kærleika Jesusar hóast hart leikaði á hjá honum.



# OKTOBER

| | | |
|---|---|---|
| Leygardagur 1. | **Jóh 6,60-71** // Tú hevur orð hins æviga lívs | |
| Sunnudagur 2. | 16.s.e. tríeindardag // **Jóh 11,19-45** | |
| Mánadagur 3. | **3 Mós 23,27-38** // Tit skulu svølta tykkum | |
| Týsdagur 4. | **2 Sám 12,15-25** // Tá ið barnið enn var á lívi | |
| Mikudagur 5. | **Jes 58,1-9** // Man hetta vera føsta, sum mær líkar? | |
| Hósdagur 6. | **Sak 7,1-14** // Er tað mín vegna, at tit hava fastað? | |
| Fríggjadagur 7. | **Matt 6,16-23** // Salva høvur títt | |
| Leygardagur 8. | **Opb 21,1-8** // Sí, eg geri allar lutir nýggjar! | |
| Sunnudagur 9. | 17.s.e. tríeindardag // **Mark 2,14-22** | |
| Mánadagur 10. | **5 Mós 30,11-20** // Elska Harran, Guð tín | |
| Týsdagur 11. | **Hás 4,1-11** // Hvør mikið betri er ást tín enn vín | |
| Mikudagur 12. | **Jes 5,1-7** // Mín ástvinur átti sær víngarð | |
| Hósdagur 13. | **Mark 12,1-12** // Hvat man nú víngarðsins harri gera? | |
| Fríggjadagur 14. | **Róm 11,11-24** // Greinarnar vórðu brotnar av | |
| Leygardagur 15. | **1 Jóh 4,1-10** // Kærleikin er av Gudi | |
| Sunnudagur 16. | 18.s.e. tríeindardag // **Jóh. 15,1-11** | |
| Mánadagur 17. | **5 Mós 18,9-22** // Eg skal vekja teimum profet upp | |
| Týsdagur 18. | **2 Sám 7,1-17** // Tá man eg reisa ætt tína eftir teg | |
| Mikudagur 19. | **Jer 23,1-8** // Kongur við skynsemi | |
| Hósdagur 20. | **Luk 6,12-19** // Valdi út tólv | |
| Fríggjadagur 21. | **Áps 7,51-60** // Sí, eg síggi himlarnar opnar | |
| Leygardagur 22. | **Róm 10,5-17** // So kemur tá trúgvin av tí, sum verður hoyrt | |
| Sunnudagur 23. | 19.s.e. tríeindardag // **Jóh. 1,35-51** | |
| Mánadagur 24. | **2 Krýn 36,11-21** // Teir spottaðu ørindrekar Guds | |
| Týsdagur 25. | **Sl 118,1-16** // Eg árendur varð, komin til fals | |
| Mikudagur 26. | **Sl 118,17-29** // Vælsignaður veri hann, sum kemur | |
| Hósdagur 27. | **Matt 23,34-39** // Jerusalem! Jerusalem! | |
| Fríggjadagur 28. | **Luk 3,1-9** // Tey vórðu doypt, í tí tey játtaðu syndir sínar | |
| Leygardagur 29. | **Luk 3,10-20** // Hann bar fólkinum gleðiboðskapin | |
| Sunnudagur 30. | 20.s.e. tríeindardag // **Matt 21,28-44** | |
| Mánadagur 31. | **Sl 27,1-6** // Harrin er ljós mítt og frelsa mín | |

# NOVEMBER

| | |
|---|---|
| Týsdagur 1. | **Jes 9,1-6** // Eina ferð skal ikki vera myrkur |
| Mikudagur 2. | **Jes 60,1-6** // Heidningarnir stevna at ljósi tínum |
| Hósdagur 3. | **Áps 26,9-18** // Eg sá ljós av himni |
| Fríggjadagur 4. | **1 Pæt 2,1-10** // Hann kallaði tykkum frá myrkrinum |
| leygardagur 5. | **Opb 7,9-17** // Skrýddir í longum hvítum klæðum |
| Sunnudagur 6. | Alla halganna dagur // **Matt 5,13-16** |
| Mánadagur 7. | **Job 22,21-30** // Hann hjálpir tí, ið hyggur niður |
| Týsdagur 8. | **Sl 18,26-37** // Eyðmjúkum fólki tú bjargar |
| Mikudagur 9. | **Esek 34,1-16** // Seyðir mínir reikaðu um |
| Hósdagur 10. | **Esek 34,17-31** // Eg skal nú koma seyðum mínum til hjálpar |
| Fríggjadagur 11. | **Luk 19,1-10** // Í dag má eg koma at gista í tínum húsi |
| Leygardagur 12. | **Ják 4,1-10** // Tit kunnu ikki fáa |
| Sunnudagur 13. | 22.s.e. tríeindardag // **Matt 18,1-14** |
| Mánadagur 14. | **Jer 31,18-30** // Soleiðis vil eg nú vaka yvir teimum |
| Týsdagur 15. | **Jer 31,31-40** // Eg geri nýggjan sáttmála |
| Mikudagur 16 | **Luk 10,1-12** // Grøðið tey sjúku |
| Hósdagur 17. | **Luk 10,13-24** // Sæl eru tey eygu, sum síggja tað, ið tit síggja |
| Fríggjadagur 18. | **Jóh 9,13-23** // Hann er profetur |
| Leygardagur 19. | **Jóh 9,24-31** // Eg, sum var blindur, síggi nú |
| Sunnudagur 20. | Síðsti s.e. tríeindardag // **Mark 12,38-44** |
| Mánadagur 21 | **Sl 122,1-9** // Vit fara í Harrans hús |
| Týsdagur 22. | **Sl 148,1-14** // Tey skulu lova Harrans navni |
| Mikudagur 23. | **Jes 40,9-17** // Sí, Harrin drottin kemur |
| Hósdagur 24. | **Jes 62,6-12** // Sí, frelsa tín kemur! |
| Fríggjadagur 25. | **Sak 9,9-17** // Hann birtir frið millum tjóða |
| Leygardagur 26. | **Matt 27,11-26** // Ert tú kongur Jødanna? |
| Sunnudagur 27. | 1.s. í advent // **Matt 21,1-9** |



### Stuðla kristnu sjónvarpsstøðini Sat-7

Sat-7 er ein sjónvarpsstøð, sum sendir kristiligar og almannagagnligar sendingar á satelitti, ið sæst um alt Miðeystur og Norðurafrika. Sat-7 eru fleiri sendistøðir og sent verður á trimum málum samstundis, arabiskum, turkiskum og persiskum (iranskum), alt døgnið, umframt eina serliga barnarás og eina skúlarás.

Endamáli hjá Sat-7 er at síggja eina vaksandi kirkju í Miðeystri og Norðurafrika, ið er trygg í kristnari trúgv og vitniburði, tænandi felagsskapinum og at gera gott fyri samfelag og mentan.

Hetta verður gjørt við at veita kirkjum og kristnum í Miðeystri og Norðurafrika, møguleika fyri at vitna um Jesus Kristus ígjøgnum innblásandi, kunnandi og útbúgvandi sjónvarpstænastur.

Ynskir tú at stuðla Sat-7, kanst tú flyta gávu á konto 6460-382.873.7


## KEYP Á NETINUM!

Føroyskar og útlendskar bøkur, kort og annað kristiligt tilfar kann keypast á nethandlinum hjá Heimamissiónsforlagnum.

Far inn á www.manna.fo og hygg nærri.

Heimamissiónsforlagið

## Bíbliufelagið

Bíbliufelagið hevur heimasíðuna www.biblia.fo

Trýst á „Les Bíbliuna". Her kanst tú lesa bíbliuna og fáa hana upplisnað við at trýsta á "Lurta" ovarlaga á síðuni. Tað ber eisini til at goyma upplesturin sum fílu við at trýsta á Lurta

So kanst tú lurta á tíni teldu ella fartelefon

www.biblia.fo

## STÝRISLIMIRNIR Í FØROYSKA BÍBLIUFELAGNUM

**Jógvan Fríðriksson**, forseti í stýrinum, biskupur, fólkakirkjan
**Bergur D. Joensen**, formaður í stýrinum, sóknarprestur, fólkakirkjan
**Dánial á Dul Jacobsen**, næstformaður í stýrinum, hvítusunnusamkomurnar
**Uni Næs**, stýrislimur, dómpróstur, fólkakirkjan
**Pauli Høj**, stýrislimur, pastorur í Kelduni, karismatisku kirkjurnar
**Heini Ziska Dahl**, stýrislimum, lærari, Katólska kirkjan
**Jenny Lydersen**, stýrislimur, undirvísingarleiðari á Mentamálaráðnum, fólkakirkjan
**Andrias Magnussen**, stýrislimur, aðalskrivari, Kirkjuliga Heimamissiónin
**Atli Rasmussen**, stýrislimur, Kirkjuliga Missiónsfelagið, Risk & Compliance leiðari í Norðoya Sparikassa
**Tummas Lauritsen**, stýrislimur (valdur á aðalfundi 2018), faklærari í Tekniska skúla
**Hallgerð Akurstein**, stýrislimur (vald á áðalfundi 2018), lærari
**Gunnar K. Nattestad**, aðalskrivari hjá Bíbliufelagnum
**Jóngerð MIkkelsen,** forlagsleiðari

## ENDAMÁL

**Endamálið hjá Føroyska Bíbliufelagnum er:**

1. at geva út Bíbliuna og partar av henni á føroyskum máli og at fáa Bíbliuna út
2. at skipa fyri at týða Bíbliuna ella partar av henni, at endurskoða verandi bíbliuútgávur, at geva út bíbilsku skriftirnar í øðrum útgávum enn teimum løggildu og annað viðkomandi tilfar
3. at fremja bíbliunýtslu, bíbliulesnað og bíbliukunnleika
4. at hava innsavningar og forlagsvirksemi
5. at umsita sambandið við útlendsk bíbliufeløg
6. at stuðla altjóða bíbliuarbeiði

## STYTTINGAR

| | |
|---|---|
| Ám. | Ámos |
| Áps. | Ápostlasøgan |
| Dán. | Dánjal |
| Dóm. | Dómarabókin |
| Ef. | Efesusbrævið |
| Est. | Esterarbók |
| Esek. | Esekiel |
| Esra | Esra |
| Fil. | Filippibrævið |
| Filem. | Filemonsbrævið |
| Gal. | Galatabrævið |
| Hab. | Hábakkuk. |
| Hagg. | Haggai |
| Harm. | Harmljóðini |
| Hás. | Hásongurin |
| Hebr. | Hebrearabrævið |
| Hós. | Hósea |
| Ják. | Jákupsbrævið |
| Jer. | Jeremia |
| Jes. | Jesaja |
| Job. | Job |
| Jóel | Jóel |
| Jóh. | Evangeliið eftir Jóhannes |
| Jón. | Jónas |
| 1. Jóh. | Fyrsta bræv Jóhannesar |
| 2. Jóh. | Annað bræv Jóhannesar |
| 3. Jóh. | Triðja bræv Jóhannesar |
| Jós. | Jósva |
| Jud. | Judasarbrævið |
| Kol. | Kolossubrævið |
| 1. Kong. | Fyrra Kongabók |
| 2. Kong. | Seinna Kongabók |
| 1. Kor. | Fyrra Korintbrævið |
| 2. Kor. | Seinna Korintbrævið |
| 1. Krýn. | Fyrra Krýnikubók |
| 2. Krýn. | Seinna Krýnikubók |
| Luk. | Evangeliið eftir Lukas |
| Mál. | Málaki |
| Mark. | Evangeliið eftir Markus |
| Matt. | Evangeliið eftir Matteus |
| Mika | Mika |
| 1. Mós. | Fyrsta Mósebók |
| 2. Mós. | Onnur Mósebók |
| 3. Mós. | Triðja Mósebók |
| 4. Mós. | Fjórða Mósebók |
| 5. Mós. | Fimta Mósebók |
| Náh. | Náhum |
| Óbad. | Óbadia |
| Opb. | Opinberingin |
| Orðt. | Orðtøkini |
| 1. Pæt. | Fyrra Pætursbrævið |
| 2. Pæt. | Seinna Pætursbrævið |
| Præd. | Prædikarin |
| Róm. | Rómverjabrævið |
| Rut. | Rutarbók |
| 1. Sám. | Fyrra Sámuelsbók |
| 2. Sám. | Seinna Sámuelsbók. |
| Sef. | Sefanja |
| Sl. | Sálmarnir |
| 1. Tess. | Fyrra Tessalónikubrævið |
| 2. Tess. | Seinna Tessalónikubrævið |
| 1. Tim. | Fyrra Timoteusarbrævið |
| 2. Tim. | Seinna Timoteusarbrævið |
| Titus. | Titusbrævið |
| Sak. | Sakarja |

# ESKJA TIL BÍBLIUVERS




Eitt bíbliuvers gevur høvi til umhugsan og kann eggja til bíbliulesnað.
Bíbliufelagið hevur latið gjørt eskjur til bíbliuvers. Eskjan hevur ein vakran reyðan lit og kann standa ella hanga í forkirkjuni og í missións- og samkomuhúsum o.ø.
Á eskjuni er teksturin: „Fá tær eitt bíbliuvers.“
Í hvørjum bunti av bíbliuversum eru umleið 250 kort við ymiskum bíbliuversum.
Eskja og bíbliuvers fáast til keyps frá Bíbliufelagnum.




Bíbliu-Appin er til iPhone, iPad, iPod touch og Android. Les meira á www.biblia.fo

Bíbliufelagið hevur latið gjørt Bíbliu-App til Dahl/Viderø Bíbliuna. Við appini kanst tú lesa alla Bíbliuna á fartelefonini/teldlinum, leita í Bíbliuni, fáa mannakorn til hvønn dag, deila á facebook og mangt annað.

**Vitja heimasíðuna hjá Bíbliufelagnum**
**Á heimasíðuni ber til at lesa og hoyra upplestur (teldutala) av Bíbliuni og greinum.**


**Les meira á: www.biblia.fo**
**Føroyska Bíbliufelagið**
**Giljavegur 32**
**FO-360 Sandavágur**
**T-postur: biblia@biblia.fo**